











# SAMANUMTIKIÐ...

Sunnukvøldið var Planet Awards 2009, og við fleiri ymiskum framførslum, gjørdist hetta eitt stuttligt og undirhaldandi kvøld. Framførslur vóru frá Analog Norð, Brandi Enni, Marius og Jógvani Hansen. Jákup Veyhe legði leiðina framvið, og prógvaði enn einaferð, at hann er ein tann besti skemtarin í landinum, og aftrat sær hevði hann Kim Hansen, sum eisini telist millum bestu klaverspælarar í Føroyum.

Dansigenturnar Hóps framførdu eitt dansishow, sum var ógvuliga hugtakandi og mest sum poppkent. Og kvøldið endaði við einum braki, tá ið Besti Bólkur 2009, Páll Finnur Páll, trinu á pall, og framførdu øll síni fúlu, skemtingasomu og fólksligu løg.

Skal takast saman um má sigast, at kvøldið sum heild riggaði væl. Fólk vóru í góðum lag, og stemningurin var avbera góður. Tó vóru onkrir smávegis trupulleikar við tí tøkninliga partinum, men hetta bleiv eftir øllum at døma fyrigivið, tá ið allir teir fantastisku undirhaldararnir trinu á pallin.

Nógvar smálutir skulu hóska saman til eitt slíkt tiltak, tá ið live framførslur eru á pallinum, og tiltakið skal sendast beinleiðis í Rás2. Til tíðir vóru nakrir smáir trupulleikar at hóma við ljóðinum, men sum heild ávirkaði hetta ikki kvøldið stórvegis – heldur ikki fyri tey, sum hava lurtað kring landið.

Undir øllum umstøðum vil Miðlahúsið takka øllum teimum, sum gjørdi hetta kvøldið til enn eina succés, og soleiðis hjálpti okkum, at heiðra teimum bestu innan føroyskan tónleik.